## Stríðast um seinastu ítróttar-greinina á Rhodos

**Judo ella badminton kunnu rúka út av Oyggjaleikunum á Rhodos um tvey ár, men føroyska Oyggjaleikanevndin vónar, at ein semja verður gjørt, so at báðar ítróttargreinarnar kunnu verða við. Endaliga avgerðin fellir týsdagin**

RHODOS
*Eyðun*
*eydun@sosialurin.fo*

Rhodos verður vertur fyri Oyggjaleikunum um tvey ár, men síðani Rhodos fekk vertsskapin tillutaðan, er tann broytingin hend, at samlaða talið á ítróttargreinum til Oyggjaleikirnar er skorið úr 15 og niður í 14.

Hetta hevur skapt ivamál um, hvussu nógvar ítróttargreinar skulu verða við á Oyggjaleikunum í 2007.

Rhodos heldur seg hava fingið ymiskar meldingar um hetta frá Oyggjaleikanevndini og hevur mest sum sjálvt tikið avgerð um, at 14 – og ikki 15 – ítróttargreinar skulu verða við í 2007.

### Badminton ella judo

Fyrireikararnir á Rhodos mæla til, at badminton ikki verður tikið av aftur skránni fyri leikirnar í 2007. Orsøkin til, at júst badminton skal lúkast burturúr, er, at tey á Rhodos ikki eru so stinn í badminton, og at eisini fyriskipanin av hesari ítróttargrein er trupul á oynni.

Eitt annað uppskot er síðani komið um, at judo skal strikast av listanum yvir ítrottargreinar í 2007.

– Vit vóna, at ein semja verður gjørd fyri leikirnar í 2007, so at 15 ítróttargreinar verða við har, og bæði judo og badminton fáa innivist. Eftir tað kunnu tað so vera í mesta lagi 14 ítróttargreinar til hvørjar leikir, sigur Sofus Johannesen, sum er limur í føroysku Oyggjaleikanevndini.

Avgerðin um hetta verður tikin á aðalfundinum hjá IGA týsdagin seinnapartin.

# Løgmaður heppar á føroysku ítróttarfólkini

**Jóannes Eidesgaard hevur seinastu dagarnar verið í Hetlandi, har hann hevur fylgt við byrjanini av Oyggjaleikunum**

OYGGJALEIKIR
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Løgmaður var við til setanina av Oyggjaleikunum leygarkvøldið, og síðani hevur hann fylgt fleiri av ítróttarkappingunum hjá føroysku luttakarunum.

Sunnudagin spákaði løgmaður millum byrsuskotini á Tingvøllum, har føroyskir skjúttar royndu seg fyri fyrstu ferð í 12 ár, og seinni á degnum var hann til millum annað fótbólt og súkkling.



*Løgmaður Jóannes Eidesgaard til skjóting í Hetlandi. Undir liðini á honum Bente Kjær og kona løgmann, Anita*

Løgmaður verður á Oyggjaleikunum til týskvøldið, tá ið hann fer úr Hetlandi aftur.

## Oyl-støður

**Borðtennis, lið**
**Bólkur B**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Guernsey | 3 | 3 | - | 0 | 16 | 5 | 11 | 6 |
| 2 Grønland | 3 | 2 | - | 1 | 16 | 5 | 11 | 4 |
| 3 Føroyar | 3 | 2 | - | 1 | 14 | 7 | 7 | 4 |
| 4 Jersey | 3 | 2 | - | 1 | 9 | 12 | -3 | 4 |
| 5 Orkney | 3 | 0 | - | 3 | 5 | 16 | -11 | 0 |
| 6 Áland | 3 | 0 | - | 3 | 3 | 18 | -15 | 0 |

**Badminton, lið**
**Undanbólkur A**

| | d | v | - | t | v dystir | t dystir | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jersey | 2 | 2 | - | 0 | 9 | 1 | 8 | 2 |
| 2 Føroyar | 2 | 1 | - | 1 | 6 | 4 | 2 | 1 |
| 3 Gibraltar | 2 | 0 | - | 2 | 0 | 10 | -10 | 0 |

**Flogbóltur, kvinnur**
**Bólkur A**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Føroyar | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 2 Áland | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| 3 Bermuda | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 1 |
| 4 Orkney | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 1 |

**Flogbóltur, menn**
**Bólkur A**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Áland | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| 2 Grønland | 2 | 1 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 3 |
| 3 Gotland | 2 | 1 | - | 1 | 4 | 3 | 1 | 3 |
| 4 Føroyar | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| 5 Hetland | 2 | 0 | - | 2 | 0 | 6 | -6 | 2 |
| 6 Orkney | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 1 |

**Fótbóltur, kvinnur**

| | d | v | - | j | - | v t | t mál | mál | +/- |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Áland | 16 | 1 | - | 0 | - | 0 | 6 | 0 | 6 |
| 2 Føroyar | 16 | 1 | - | 0 | - | 0 | 6 | 0 | 6 |
| 3 Bermuda | 16 | 1 | - | 0 | - | 0 | 5 | 0 | 5 |
| 4 Hetland | 16 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 5 | -5 |
| 5 Guernsey | 16 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 6 | -6 |
| 6 Isle of Man | 16 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 6 | -6 |

# Nýggj oyggjakapping á veg

**Hugskot er nú frammi um at skipa fyri einari oyggjakapping fyri tær ítróttargreinar, sum ikki sleppa við til sjálvar Oyggjaleikirnar. Formaðurin fyri føroysku Oyggjaleikanevndina vil heldur hava fleiri ítróttargreinar við til sjálva Oyggjaleikirnar**

OYGGJALEIKIR
*Eyðun*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Síðst í juni mánaði var ein kapping á Gibraltar, har fleiri av oyggjunum, sum eru við til Oyggjaleikirnar, kappaðust í eitt nú kurvabólti, sum ikki slapp upp í part á Oyggjaleikunum í Hetlandi.

Onkrar slíkar kappingar hava verið áður, og nú er hugskot frammi um at skipa fyri mini-oyggjaleikum undir IGA, har kappast verður í teimum ítróttargreinum, sum ikki eru við til leikirnar.

18 ítróttargreinar standa á listanum, sum veljast kann burtur úr til Oyggjaleikirnar. Av hesum skulu í minsta lagi 12 og í mesta lagi 14 ítróttargreinar verða við til hvørjar leikir.

Hetta hevur við sær, at tað hvørja ferð eru nakrar ítróttargreinar, sum enda úti í kuldanum.

### Nýggj kapping

Fleiri av oyggjunum, sum eru limir í IGA, eru farnar at tosa um at skipa fyri einari kapping fyri hesar ítróttargreinar, og kappingin skal haldast á øðrum staði og til aðra tíð enn sjálvir Oyggjaleikirnir.

– Hetta er ikki meira enn ein vánalig troystipremia, tí sjálvandi vilja ítróttarfólkini heldur verða við til sjálvar Oyggjaleikirnar. Tí haldi eg, at tað er eitt betur hugskot av hava fleiri ítróttargreinar við til Oyggjaleikirnar. Tað er jú har, øll vilja vera, sigur Sølvi Reinert Hansen, formaður í føroysku Oyggjaleikanevndini.

– Tað kann eisini gerast dýrt, um IGA skal standa fyri tveimum Oyggjaleikakappingum sama summar. So heldur hava ein nakað størri kapping, heldur hann.

### Málið verður umrøtt

Kappingin, sum júst hevur verið á Gibraltar, eydnaðist sera væl, og hon er viðvirkandi til, at hugskotið um eina nýggja oyggjakapping hevur fingið bein at ganga á.

IGA hevur aðalfund týsdagin, og tá fáa almennu umboðini fyri tær 24 oyggjarnar, sum eru við í Oyggjaleikunum, høvi at stinga høvdini saman um eina slíka kapping.

– Eg rokni við, at hetta málið verður tikið upp á fundinum týsdagin, og tað fæst so at vita, hvat limalondini halda um hugskotið, sigur Sølvi Reinert Hansen.